# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit kunnu á ongan hátt góðtaka tað, sum er hent í nátt*
*(suðurkoreanskur talsmaður).*




*Í Japan komu bløðini út við einari eykaútgávu í morgun.*
*mynd Reuters*

# Norðurkorea bjóðar umheiminum av

**Norðurkorea letur ikki altjóða ávaringar við seg koma. Í nátt royndi landið eina kjarnorkubumbu undir jørð.**

Amerikanskir serfrøðingar siga, at var talan veruliga um eina kjarnorkubumbu, so var hon lítil. Í Suðurkorea skrásett jarðfrøðistovnurin ristingar, sum vóru 3,7 á Richterstiganum, og har halda teir ikki, at spreingingin var so veik.

Men sama um talan var um eina veika ella sterka spreinging, so hevur norðurkoreanska avgerðin at royna eina kjarnorkubumbu elvt til øsing í Fjareystri og aðrastaðni. Í grannalandinum Suðurkorea sendi Roh Moo-hyun, forseti, boð eftir trygdarráðnum hjá stjórnini í morgunn at umrøða støðuna.

-Vit kunnu á ongan hátt góðtaka tað, sum er hent í nátt, og vit fara saman við okkara sameindu at geva Norðurkorea eitt hóskandi svar, segði talsmaðurin hjá forsetanum í morgun.

Í Japan segði Taro Aso, uttanríkisráðharri, at royndarspreingingin er ikki bara ein hóttan ímóti Landnyrðingsasia, men øllum heiminum, og avstralska stjórnin vil hava ST-trygdarráðið at seta tiltøk í verk ímóti Norðurkorea alt fyri eitt.

-Vit eru til reiðar at taka undir við búskaparligum tiltøkum, segði John Howard, forsætisráðharri, í morgun.

### Kina fordømdi

Norðurkorea varskógvaði kinesisku stjórnina 20 minuttir undan spreingingini, og Beijing kunnaði alt fyri eitt USA, Japan og Suðurkorea um boðini. Men kinesiska stjórnin var alt annað enn fegin um royndarspreingingina.

-Norðurkorea hevur skúgvað mótstøðuna hjá altjóða samfelagnum til viks og hevur framt eina skammiliga royndarspreinging. Vit eru avgjørt ímóti hesari framferðini, stóð í einari kunngerð frá kinesisku stjórnini, sum bleiv lisin í almenna sjónvarpinum í morgun.

Samstundis eggjaði Kina norðurkoreonsku stjórnini til at steðga øllum tiltøkum, sum kunnu gera støðuna uppaftur verri.

### USA krevur hóskandi svar

Amerikanska stjórnin var eisini skjót at gera vart við seg, tá tíðindini um spreingingina komu.

-Norðurkorea sigur seg hava framt eina kjarnorkuroyndarspreinging. Er tað so, er tað ein álvarssamur tilburður, segði talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Tony Snow. Hann legði afturat, at USA fylgir gjølla við gongdini í Fjareystri, og at norðurkoreanska royndarspreingingin ger tað neyðugt hjá USA at tryggja síni sameindu í økinum uppaftur betur.

-Men fyrst vænta vit, at ST-trygdarráðið fer at koma við einum hóskandi svari, segði Tonmy Snow. Hann upplýsti samstundis, at amerikanska fregnartænastan hevði skrásett ristingar í einum kjarnorkuroyndarøki í Norðurkorea í nátt. kjarnorkuroyndarspreinging. Er tað so, er tað ein álvarssamur tilburður, segði talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Tony Snow. Hann legði afturat, at USA fylgir gjølla við gongdini í Fjareystri, og at norðurkoreanska royndarspreingingin ger tað neyðugt hjá USA at tryggja síni sameindu í økinum uppaftur betur.

-Men fyrst vænta vit, at ST-trygdarráðið fer at koma við einum hóskandi svari, segði Tonmy Snow. Hann upplýsti samstundis, at amerikanska fregnartænastan hevði skrásett ristingar í einum kjarnorkuroyndarøki í Norðurkorea í nátt.

## STUTT SAGT

## Fegnast um myndir av Mars

Amerikanskir rúmdargranskarar eru púra ovfarnir av myndum, sum rúmdarfarið Opportunity hevur sent av einum stórum gosopi á gongustjørnuni Mars.

-Eg havi snøgt sagt ikki orð fyri hesum, sigur granskarin Jim Bell við BBC, og Steve Squyres, ið stendur fyri verkætlanini við Opportunity, sigur, at myndirnar av gosopinum eru millum tær bestu og mest áhugaverdu, sum hann nakrantíð hevur sæð.

Victoria-gosopið á Mars er einar 800 metrar í tvørmát. Síðurnar eru berar og brattar, og granskarar halda, at tær kunnu avdúka týðandi upplýsingar um fortíðina hjá gongustjørnuni. Sum skilst hevur Opportunity longu funnið haldgóð prógv fyri, at grótið hevur verið í sambandi við vatn fyri fleiri milliónum árum síðani, skrivar Reuters.

Opportunity stendur beint við gosopið, og ætlandi skal farið kanna tað eitt sindur afturat, áðrenn granskararnir skulu taka støðu til, um teir skulu senda farið niður í sjálvt opið.

## Høgrasigur í Belgia

Sum væntað fekk tann víðgongdi høgraflokkurin Vlaams Belang eitt gott úrslit á kommunuvalinum í Belgia í gjár, men úrslitið var kortini ikki so gott, sum flokkurin hevði vónað. Tað kemst kanska av, at teir seinastu dagarnar hava nógvir belgiumenn mælt veljarunum frá at styðja tann víðgongda politikkin hjá flokkinum, sum millum annað hevur skotið upp, at eingi fremmandafólk skulu sleppa til Belgia.

Eitt nú hevði Vlaams Belang vónað at vinna meiriluta í býráðnum í Antwerpen, sum er tann største býurin har norðuri í landinum, men tað eydnaðist ikki. Tvørturímóti gjørdist tann flamski sosialistaflokkurin tann stóri sigursharrin í Antwerpen. Vlaams Belang hevði harafturímóti stóra framgongd í fleiri smáum kommunum ymsastaðni í Flandern, har fólk tosa flamskt.

Samgonguflokkarnir í stjórnini hjá Guy Verhofstadt, forsætisráðharra, fingu yvirhøvur eitt vánaligt úrslit á kommunuvalinum hesaferð.

## 25 ár síðani Sadat-morðið



Fríggjadagin vóru 25 ár, síðani egyptiski forsetin Anwar Sadat bleiv myrdur undir einari hernaðarframsýning í høvuðsstaðnum Kairo. Framsýningin varð hildin í sambansi við, at átta ár vóru liðin síðani Yom Kippur-kríggið millum Egyptaland og Ísrael í 1973.

Anwar Sadat stóð á einum palli, tá tvær granatir brustu stutt frá honum. Síðani lupu nakrir menn á pallin og skutu eftir forsetanum og teimum, sum stóði undir liðini á honum. Sadat varð so meint raktur, at hann doyði beinanvegin. Fleiri onnur doyðu. Seinni vórðu 25 limir í einum víðgongdum felagsskapi settir fyri rættin, og tað endaði við, at fimm teirra vórðu avrættaðir. Hinir fingu langa fongsulsrevsing.

Anwar Sadat var tann fyrsti arabiski leiðarin, sum skrivaði undir friðarsáttmála við Ísrael. Tað var í 1979, og avgerð hansara elvdi til split í tí arabiska heiminum.

Núverandi forsetin í Egyptalandi, Hosni Mubarak, tók við eftir Sadat.